# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*–Vit hava ongantíð verið í kríggi við USA. Vit eru vinir*
*(franski innanríkisráðharrin)*




*Sleppur Göran Persson at halda fram? Ella tekur Fredrik Reinfeldt við?*

# Eitt val um arbeiði

**Fimti hvør svii niðan fyri 25 ár er arbeiðsleysur, og arbeiðsloysið er høvuðsspurningurin upp undir ríkisdagsvalið sunnudagin**

Tann 21 ára gamla Charity Odum sendi 200 umsóknir um arbeiði tann fyrsta mánaðin, eftir at hon var vorðin arbeiðsleys. Men svarið var tað sama allastaðni. Einki arbeiði til hennara.

Hon er ikki einsamøll. Í gjár høvdu teir borgarligu flokkarnir eina lýsing í øllum teimum stóru svensku bløðunum, har sagt varð, at Svøríki er á odda í heiminum, tá tað snýr seg um arbeiðsloysi millum tey ungu. Heilt rætt var tað ikki, tí sambært hagtølunum hjá ES hevur Svøríki tað fjórðistørsta arbeiðsloysið í Vesturevropa millum fólk niðan fyri 25 ár.

Tað eru teir borgarligu flokkarnir, sum hava drigið arbeiðsloysið upp í valstríðið, og teir lova fleiri arbeiðspláss, sleppa teir at skipa stjórn. Tað kemur ikki sosialdemokratunum væl við.

– Sjálvandi hevur tað stóran týdning, at fólk hava arbeiði. Sjálvur havi eg ein son, sum hevur søkt arbeiði í fleiri mánaðir, sigur Jan Eliasson, uttanríkisráðharri, við Dagsavisen. Í sínumn valrøðum og sum uttanríkisráðharri leggur hann dent á støðu Svøríkis úti í heimi, men hann ásannar, at fólk vilja heldur hoyra um arbeiði enn uttanríkispolitikk.

### Í mótálop

Teir borgarligu andstøðuflokkarnir vilja vera við, at í veruleikanum er arbeiðsloysið í Svøríki umleið 20 prosent, um øll verða tikin við. Teirra boðskapur er at lækka skattin og arbeiðsloysisstuðulin fyri at fáa fólk til arbeiðis. Harafturat ætla teir, at arbeiðsgevarar, sum seta ungfólk í arbeiði, skulu gjalda hálvt arbeiðsmarknaðargjald.

Sosialdemokratarnir hava undir valstríðnum hildið uppá, at arbeiðsloysið minkar, og Göran Persson, forsætisráðharri, hevur sagt, at arbeiðsloysið fer at koma niður ímóti fýra prosentum í heyst.

Tað eru kortini mong, sum halda, at stjórnin hevur lagt ov lítlan dent á arbeiðsloysið hetta seinasta valskeiðið. Sunnudagin fáa vit at síggja, at tølv ára sosialdemokratiskt stýri fer fyri bakka orsakað av arbeiðsloysinum. Göran Persson hevur skilt, at tað kann henda, og tí er hann farin í mótálop. Teir seinastu dagarnar hevur hann nýtt hvørt einasta høvi til at finnast at ætlanini hjá teimum borgarligu at skerja arbeiðsloysisstuðulin og avlamispensjónirnar. Og tað virkar.

– Eg ætli mær at velja Persson. Eg kenni meg ikki trygga, um teir borgarligu vinna. Vit mugu eisini hava okkurt at liva av, tá vit einki arbeiði hava, sigur Charity Odum við Dagsavisen.

## 47,9 - 47,3

So javnt verður svenska ríkisdagsvalið sunnudagin, um tann seinasta veljarakanningin heldur. Kanningin, sum stovnurin Sifo hevur gjørt, varð almannakunngjørd í morgun, og hon gevur stjórnarsamgonguni 47,9 prosent av atkvøðunum og teimum fýra borgarligu andstøðuflokkinum 47,3 prosent.

## STUTT SAGT

## Báðir partar framdu krígsbrotsverk

Amnesty International vil vera við, at bæði Ísrael og Hizbollah framdu krígsbrotsverk undir krígnum í summar.

AI hevur fyrr sagt, at ísraelski herurin breyt fólkarættin, tá hann skipaði fyri álopum, sum eftir øllum at døma vóru vend ímóti sivilum málum í Libanon. Nú sigur felagsskapurin, at Hizbollah royndi eisini at raka sivilmál, tá felagsskapurin sendi rakettir eftir ísraelskum býum. Tað er greitt brot á altóða reglur um krígsførslu, sigur Amnesty International og leggur afturat, at tey hørðu ísraelsku álopini rættvísgera á ongan hátt brotini hjá Hizbollah.

Undir krígnum, sum vardi umleið ein mánað, sendi Hizbollah næstan 4.000 rakettir eftir málum í Ísrael. 43 sivilfólk doyðu, og 33 vórði illa særd. Amnesty International vísir á, at fleiri hundraðtúsund ísraelsmenn flýddu ella fjaldu seg í bumbuskýlum, og at talið á deyðum hevði verið munandi størri, um tey ikki flýddu ella fjaldu seg.

## Brotsmaður fjaldi seg í 16 ár

Í 16 ár hevur løgreglan í Grikkalandi leitað eftir Nikos Palaiokostas, sum flýddi úr einum fongsli í 1990, har hann sat dømdur fyri fleiri innbrot.

Griksk bløð skriva, at løgreglan kom fram á Palaiokostas í býnum Vioti nakað norðan fyri høvuðsstaðin Athen. Løgreglan hevði sett eina vegabyrging upp, men tann eftirlýsti brotsmaðurin koyrdi ígjøgnum byrgingina, og 10 vápnaðir løgreglumenn fóru aftan á honum. Brotsmaðurin steðgaði ikki kortini, fyrr enn hann misti harradømið á bilinum. Hann varð alt fyri eitt lagdur í hondjørn og fluttur til Athen.

Løgreglan hevur illgruna um, at tað var Niko Palaiokostas, sum burturflutti handilsmannin Alexandros Haitoglou í 1995. Handilsmaðurin varð seinni latin leysur, men tá høvdu skyldfólk hansara goldið burturflytaranum góðar tríggjar milliónir krónur í loysigjaldi.

Grikska løgreglan hevur fleiri ferðir verið í hølunum á Palaiokostas. Fyri nøkrum árum síðani mundi løgreglan fingið fatur á honum, men hann slapp til rýmingar í síðstu løtu.

## USA-vinur fær ábreiðslur

Franski innanríkisráðharrin, Nicolas Sarkozy, hevur ongantíð dult fyri, at hann er USA-vinur, men tað hevur kortini vakt ans í Fraklandi, at hann vil hava franskar politikarar at knýta tættari bond millum tey bæði londini.

Sarkozy var í USA mánadagin, tá amerikanarar mintust 11. september í 2001, og har nýtti hann høvi til at tosa við George W. Bush, forseta og fleiri aðrar amerikanskar politikarar. Undir samrøðunum skal hann hava sagt, at Frakland eigur at knýta tættari samband við USA. Tað hevur vakt ans í Fraklandi, tí teir flestu fronsku politikararnir halda, at sum partur av Evropa skal Frakland hugsa evropeiskt og ikki knýta seg at USA. Men Sarkozy verjir sína støðu.

– USA er eitt av teimum fáu londunum, sum vit ongantíð hava verið í kríggi við. Landið er oddaland búskaparliga, politiskt og hernaðarliga, segði Sarkozy í fronskum sjónvarpi í gjár.